# Sum skógvur í hosu

## Fótbúni í søguni

Hvør sum kom við hugtakinum "fótbúni" veit eingin.

Kanska var hann eysturlendingur, sum ynskti at verja føtur sínar ímóti tí brennandi sandinum.

Kanska var hon ein vøkur kvinna úr Egyptalandi, sum ikki metti at føtur hennara vóru eins vakrar og likamsprýði hennara, og tí legði fyrstu spírarnar til skógvarnar.

Í øllum førum er greitt, at fótbúnin er gamal í garði. Egyptiskir veggmálningar, sum í øllum førum eru frá ár 1500 fyri Kristi føðing vísa fótbúna, - væl at merkja fótbúna sum er framleiddur soleiðis sum hann enn verður tað hjá handskómakarum.

Germanar brúktu somuleiðis fótbúna, men formurin var meiri primitivur, tí ein bert vant klæðir ella leðurreimar um føturnar.

Í tí gamla Rom og Grikkalandi segði fótbúnin (sandalurnar) frá um vælveru og yvirflóðina hjá honum, ið bar skógvarnar. Ofta vóru teir vakurt skrýddir og at kalla smá listaverk. Tað vanliga fólkið gekk kortini ikki í teimum.

Samstundis sum sandalurnar komu fram, byrjaðu fólk at ganga í skógvum, sum ikki fylgdu linjunum í fótinum. Millum hesar skógvar kunnu nevnast snápilskógvarnir, sum komu fram í 14-1500-talinum.

So við og við komu stivlarnir eisini fram. Orsøkin til hetta vóru tey mongu kríggini í 1700-talinum, har teir longu ryttara-stivlarnir gjørdust móti.

Sum tað sæst vóru skógvarnir bert fyri tann ríkara partin av fólkinum. Tann veruligi ídnaðurin at framleiða skógvar byrjaði í roynd og veru fyrst í 1959, tá skómakarin Lyman Blak fekk patent uppá eina seymimaskinu, sum kundi seyma gjøgnum leðrið. Frammanundan vóru gjørdar mangar royndir at finna fram til ymisk sløg av seymimaskinum.

*Kelda: skomager.dk*




*Hjá Jóhannusi finst alt tað sum ein skómakari hevur brúk fyri. Hann hevur staðið við leistin í mong ár*